

ingcentur, tá tað er útsøla. Men samanumtikið er tað fyri tað mesta positivt at vera kendur, sigur Jay.

- Vit kundu sjálvandi gjørt nógv meiri, um vit veruliga vildu dyrkað tað, at vit eru kendir, skoytir Nik uppí. – Men vit gera hetta ikki bara fyri at verða kendir. Vit vilja verða kendir fyri okkara tónleik -og bara fyri tónleikin.

- Tað er ikki feitt at vera kendur bara fyri at vera kendur. Men tá fólk rópa á okkum á gøtuni, og siga, at okkara tónleikur er feitur, tá er tað gott. Ella tá fólk koma yvir til okkum og siga, at tey hava nýtt onkran av okkara sangum, tá tey blivu gift, tá er tað feitt. Tí tá hava vit fatur á tí rætta endanum. Men alt hitt sigur okkum ikki so nógv, so tað kundu vit kanska verið fyriuttan, heldur Nik.

- Eg haldi eisini, at fólk kenna okkara nøvn og okkara tónleik, meiri enn tey kenna okkum, sigur Jay. – Um vit eru úti onkustaðni, har onkur frá x-factor eisini er, so eru tað tey frá x-faktor, sum fólk kenna aftur, tí tey eru so nógv frammi í miðlunum. Okkara andlit eru ikki so kend annað enn frá videoløgum og konsertum, vísir Jay á.

- Nú hava fólk eisini funnið útav, at vit eru seriøsir tónleikarar og at vit duga tað, vit gera. Í fyrstuni ivaðust fólk í, um hetta bara var til stuttleika. Tá var nýggheitsvirðið stórt, og fólk vóru bæði jalig og neilig. Nú vita fólk hvat vit standa fyri, fjepparaskarin veksur stútt, og bæði 5 ára gomul smábørn og 60 ára gomul koma yvir til okkara og halda, at vit eru kul og gera góðan tónleik, og tað er feitt, heldur Nik.

## Serligt show í Føroyum

- Vit vita enn ikki heilt hvat verður á skránni í Klaksvík. Vit vilja gjarna gera eitt heilt serligt show til Føroyar, eftirsum tað nú er so langt síðani vit hava verið har, og tað gera vit nakrar dagar, áðrenn vit koma til summarfestivalin, greiðir Nik frá.

- Tað gera vit við at fara í studio saman við nøkrum tónleikarum, har vit bara sita og jamma og finna útav hvat skal til fyri at gera eina stóra fest.

- Men vit kunnu gott avdúka, at vit hava gestir við, skoytir Jay uppí.

- Ja, vit koma við gestum og ætla at gera eina rímiliga stóra veitslu, tekur Nik undir við honum.

- Vit hava spælt við sama orkestrið í 8 ár, men nú hava vit gjørt av at gera nakað nýtt, og hava massar av øllum møguligum góðum við. Vit hava til dømis heitasta DJ'in í Danmark við okkum, og vit lova, at tað verður gott og festligt í Klaksvík, slær Jay fast.

*»Nú hava vit sligið navnið fast. Vit hava spælt klokkan 13 um dagin, tí fólk hava hildið okkara tónleik verið fyri børn, og klokkan 01, tí fólk hava hildið, at vit bert eru fyri ung, sum ganga á diskotek. Men tað er broytt nú. Nú eru vit eitt høvuðsnavn«*
***Nik***

*»Vit eru blivnir eldri, og tað skal eisini merkjast. Vit hava ikki gjørt nakra drastiska útvikling, men vit hava nú gloppað hurðini fyri tí politiska og fyri øðrum virðum, til dømis familju. Nú er tað ikki bara stripp-klubbar fýra dagar um vikuna longur«*
***Nik***